gult cyan magenta svart

Hugnaligu húsini

Í ár fekk Havnin n‡tt torg vi› Gongugøtuna og har standa lítil, hugnalig hús. Hetta eru nevniliga jólahúsini

JÓLASTÁKAN
Dagfinn Olsen

Hugnaligu Jólahúsini hava á›ur sta›i› í Grasagar›i í Havn, men nú eru húsini flutt oman í Mi›b‡in. N‡tt og snotuligt torg er komi› vi› Gongugøtuna. So hóast Tinghúsi› nú er vor›i› hvítt, so standa enn eini svørt hús í Mi›b‡num. Nevniliga Jólahúsini.

Jólahúsini eru lítil og fitt og sera jólalig. Myrkt er hesa ársins tí›, men hugnaligt sær út vi› ljósunum í vindeygunum. Og har hendir ikki heilt einki. Mangt forvitnisligt hendir í Mi›b‡num undan jólum. Gríma skipar fyri jólaverksta›i og hóast ikki øll síggja ta›, so starvast jólavætrar í Jólahúsunum. Hetta hendir mest á náttartí›, men úrslit síggjast eftir.

Óiva› er kærkomi› hjá børnum at vitja hugnaligu Jólahúsini og hjá teimum vaksnu er ikki av vegnum vi› eini fríløtu, nú jólastákanin veruliga tekur fer› á seg.

Jól í Mi›b‡num

16. des.	kl. 11.00	Frelsunarherurin spælir í gongugøtuni
	kl. 13.00	Jassarnir spæla í gongugøtuni
17. des.	Jólama›urin kemur til Havnar	
	kl. 15.00	Jólamenn koma vi› Thorshavn í Vágsbotn og ganga ni›an í b‡in at finna a›rar jólamenn
	kl. 17.00	Børn og ung úr Ebenezer spæla á Glade hjørn
	kl. 18.00	Jassarnir spæla í gongugøtuni
	Jólamenninir ver›a í b‡num seinnapartin	
18. des.	kl. 17.00	Jassarnir spæla í gongugøtuni
19. des.	kl. 17.00	Jassarnir spæla í gongugøtuni
	kl. 19.00	Rútmiska Kóri› í Hoydølum syngur
	Jólamenninir ver›a í b‡num seinnapartin	
20. des.	kl. 17.00	Rútmiska kóri› í Hoydølum syngur
	kl. 19.00	Cantabile syngur
	Jólamenninir ver›a í b‡num seinnapartin	
21. des.	kl. 16.00	Havnar Ungdómshornorkestur spælir
	kl. 18.00	GHM spælir
	Jólamenninir koma rí›andi í Jónas Broncksgøtu og oman á Kongabrúnna. Teir ver›a verandi í b‡num seinnapartin	
22. des.	kl. 16.00	Havnar Ungdómshornorkestur spælir
	kl. 18.00	Frelsunarherurin spælir
	Jólamenninir ver›a í b‡num	
23. des.	kl. 17.00	Sangur úr Evangeliihúsinum ver›ur í gongugøtuni
	kl. 19.00	Havnar Hornorkestur spælir í gongugøtuni og aftan á í Dr. Jakobsensgøtu.
	Jólamenninir ver›a í gongugøtuni seinnapartin.	



Gy›ja, Grani og Gandaringurin

Dramaverksta›i› vi› Hjørdis Johansen hevur ymiskt spennandi at bjó›a, nú ta› stundar til jóla. Gomlu kenningarnir Gy›ja og Grani eru at hitta og so ver›a ásko›ararnir eisini mála›ir

JÓLASTÁKAN
Dagfinn Olsen

Ikki øll kenna Dramaverksta›i› í Korkagøtu í Gundadali í Havn. Tey tilkomnu minnast óiva› orgulverksta›in, men tey yngru eru um at venjast vi› Dramaverksta›in.

Og nú ta› stundar til jóla hendir ymiskt spennandi og hugnalig leikløta er fyri stór og smá. Vi› Hjørdis Johansen á odda vekja leikarar til lívs ymsar leikir, sangur er at hoyra og so eru tey bæ›i Gy›ja og Grani eisini vi›.

Hjørdis sigur sjálv solei›is:

Fer›in á framførsluni er barnavinarlig, og longu ein hálvan tíma undan s‡ning kunnu ásko›ararnir ver›a mála›ir í andlitinum.

Dukkusjónleikur, ævint‡r, barnakór og sí›st men ikki minst tær bá›ar ví›akendu og væl uppløgdu dukkurnar Gy›ja og Grani sum pallvertar. Hetta er naka› av tí, sum børn og vaksin kunnu vera saman um á Dramaverksta›num.

Ásko›arin er vi›

Skráin byrjar vi› sangi leiddum av songkvinnuni Maluni Thomsen. Sí›ani ver›ur dukkusjónleikurin "Gandaringurin" s‡ndur, n‡ggjur leikur eftir Hjørdis Johansen. Aftaná er ævint‡rsøga um ránsmenn, dúgvur, nissur og gandafólk, spæld og søgd, har ásko›arin eisini sleppur at vera vi›.

Atgongumerki á kr. 40 fáast ein tíma undan s‡ning og á Kunningarstovuni í Havn, og ta› ræ›ur um at skunda sær, tí framførslurnar ver›a bert hesa vikuna út, gerandisdagar kl. 17.30, og leygar- sunnudagin kl. 16 og 18.

Ta› eru børnini á Dramaverksta›num, sum framføra, og tey gle›a seg til ta›.